**Nám X**
**Eysturskúlin**
**Tórshavn**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 10/2014: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 5, stk. 2, nr. 1 verður orðað soleiðis:
   ”*Stk. 2.* Í 9 ára grundskúlanum skulu allir næmingar verða undirvístir í:

| | |
|---|---|
| føroyskum | øll skúlaárini |
| kristnikunnleika | 1. – 6. skúlaár |
| donskum | 3. – 9. skúlaár |
| enskum | 4. – 9. skúlaár |
| søgu/samtíð | 4. – 9. skúlaár |
| heimsátrúnaði | 7. – 9. skúlaár” |

2. § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis:
   ”Í 10. flokki skulu hesar lærugreinar standa næmingunum í boði: Føroyskt, danskt, støddfrøði, heimsátrúnaður, ítróttur, samtíð og enskt.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2014.

**Viðmerkingar:**
Við hesum lógaruppskoti skulu næmingar hava kristnikunnleika frá 1.-6. flokk, og tá næmingurin síðan kemur í framhaldsdeildina (7.til 9. flokk), skal lærugreinin eita heimsátrúnaður.

Í 10. flokki verður kristnikunnleiki eisini broyttur til heimsátrúnað.

Vit meta, at búningarstigið á næmingum, ið eru komnir til 7. flokk, er á slíkum stigið, ið loyvir hesi broyting.

Nútíðarsamfelagið er fjølmentað og setir okkum menniskjum stórar avbjóðingar. Vit skulu alla tíðina taka støðu til ymiskt, eisini ymiskt, ið viðvíkur okkara medborgarum.

Tá er alneyðugt, at vit hava við okkum førning, ið ger okkum til rúmlig menniskju.

Búningarstigið ger eisini møguligt, at lærugreinin soleiðis broytir innihald og karakter – sum vit eisini síggja í øðrum lærugreinum sum t.d. heimstaðarlæru og náttúru/tøkni.

**Á Ungdómstingi, 10. februar 2014**

Jákup A. Henriksen Teitur J. Sigvardsen Petur S. Thomsen

Boas H. Heinesen Ronja Weihe Knútur Jóannesarson

Sveinur M. Nolsøe Vensil Djurhuus Fríði Slættalíð

Linda Fosaa